| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**29. september 2011** | Blað nr.:<br>**9236** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **29. september 2011** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:179/11-212/11**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Maria H. Olsen
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Annfinn Brekkstein
Elin Lindenskov
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Inga Dahl
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Jan Christiansen, sum hevur farloyvi

**LUTTÓKU EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Jákup E. Hansen
Jóan Petur Hentze

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**183/11** **2011-0172**

**Jan Christiansen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

**Býráðið 29. september 2011:** Samtykt.

**184/11** **2011-0217**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið til eftirtektar.

**185/11** **2011-0662**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2011**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 24. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 14. apríl 2011**: Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mars 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:**Trivnaðarstjórin greiddi frá útvaldum konto. Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri apríl 2011 verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mai og juni 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Trivnaðarstjorin greiddi frá útvaldum konto. Framlagt og góðkent.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri juli 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 29. september 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**186/11** **2011-1443**

**Fíggjarætlanin fyri 2012**

Stjórnin hevur gjørt uppskot til karmar fyri 2012.

Uppskotið verður lagt fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Framlagt.

Umsitingin hevur gjørt tíðarætlan fyri arbeiðinum við fíggjarætlanini í 2012.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Framlagt og samtykt at leggja fyri býráðið.

**Býráðið 29. september 2011:** Framlagt.

**187/11** **2011-2203**

**Fíggjarætlanin 2012 hjá Tórshavnar havn**

Sambært kommunustýrisskipanini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Áðrenn fíggjarnevndin framleggur uppskot til fíggjarætlan, leggur fíggjarnevndin uppskot til fíggjarkarmar fyri býráðið til nevndirnar at leggja fíggjarætlan eftir.

**Havnarnevndin 26. september 2011:** Samtyktu fíggjarætlanina við 1. viðgerð, sum javnvigar tkr. 49.470,- og at senda hana til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 29. september 2011:** Framlagt.

**188/11** **2011-1731**

**Uppskot til nýggjan umráðispart F-øki til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir.**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**

Í sambandi við at býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal, er m.a. skotið upp at leggja økir til frítíðarhús her (j.nr. 2011-0183).

Av tí at almenna byggisamtyktin ikki hevur nakrar ásetingar fyri frítíðarhús, er uppskot gjørt til orðing av einum F-øki til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir. Ætlanin er at somu orðingar skulu kunnu brúkast til ymisk frítíðar- og summarhúsøkir í kommununi. Tí hava vit valt ikki at hava ásetingar um td. mest loyvdu hædd, byggi- og nýtslustig v.m, men í staðin seta krav til serstaka byggisamtykt har økini verða skipað og krøv til bygging verða ásett.

**§ 24. Ásetingar fyri umráðispartin F í 3. grundumráði**

1. **Umráðisparturin verður lagdur til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir.**

2. **Skipan og bygging á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir uppskot til nýtt F-øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

**§ 24. Ásetingar fyri umráðispartin F í 3. grundumráði**

3. **Umráðisparturin verður lagdur til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir.**

4. **Skipan og bygging á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.**

Elin Lindenskov var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2011:** Nevndin samtykti at senda málið til ummælis hjá eigarum og festarum í økinum.

**Ískoyti:**
Eigarar og festarar í økinum hava havt uppskotið til ummælis og hava onga viðmerking.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðkennir uppskot til nýtt F-øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

**§ 24. Ásetingar fyri umráðispartin F í 3. grundumráði**

5. **Umráðisparturin verður lagdur til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir.**

6. **Skipan og bygging á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. september 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 29. september 2011:** Einmælt samtykt.

**189/11** **2011-0183**

**Uppskot til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal. Í dag er eingin byggisamtykt galdandi fyri hesar bygdirnar og tí ber ikki til at byggja ella frábýta øki til sethús her.

Skotið verður upp at brúka ásetingarnar í almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og leggja nøkur smærri A1-sethúsaøkir saman við verandi bygging í Norðadali og Syðradali.

Eisini hava vit skotið upp at leggja økir av til frítíðarhús í Norðradali og Syðradali.

Av tí at almenna byggisamtyktin ikki hevur nakrar ásetingar fyri frítíðarhús, er uppskot gjørt til orðing av einum F-øki til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir (j.nr. 2011-1731).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir uppskot til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal sambært kortskjali dagf. 21.07.2011.

Elin Lindenskov var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2011:** Nevndin samtykti at senda málið til ummælis hjá eigarum og festarum í økinum.

**Ískoyti:**
Eigarar og festarar í økinum hava havt uppskotið til ummælis og hava onga viðmerking.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir uppskot til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal sambært kortskjali dagf. 21.07.2011.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. september 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 29. september 2011:** Einmælt samtykt.

**190/11** **2008-4566**

**Umsókn um at sundurbýta ein part av matr. 1268a**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tórshavnar kommuna søkir um at sundurbýta ein part av matr. 1268a, Gundadalur stadionøkið, økið, talan er um at sundurbýta, er umleið 1.900 fermetrar til støddar.

Sundurbýtið skal gerast í sambandi við at Dansifrøi hevur fingið ein langatíðarsáttmála við Tórshavnar kommunu til at leiga lendið av matr. 1268a í Gundadali, eigari Tórshavnar kommuna.

Leigumálið fevnir um ein part av matr. nr. 1268a, til støddar uml. 1.900 fermetrar, sum víst á kortskjali, dagfest 31.10.2008, og sum verður matrikulerað sum sjálvstøðug ogn.

Leigumálið tekur við tann 1. januar 2008 og stendur við óuppsigiligt av báðum pørtum til 1. januar 2033.

Víst verður til kort á j.nr. 2008-4566.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti at sundurbýta umleið 1.900 fermetrar av matr. 1268a.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umhvørvisstovan hevur í skrivi boðað frá, at umsóknin um sundurbýti ikki kann gangast á møti, av tí at tað ikki er í samsvar við serstøku byggisamtykt nr. 3.

Gundadalur er partur av serstøku byggisamtykt nr. 3, sum eisini fevnir um Konmansmýru og Háls. Her er C3-øki lagt út til ítrótt og tílíkt. Ein áseting fyri C3-øki er, at hetta ikki kann stykkjast út.

Í sambandi við ein langtíðar leigusáttmála skal ognin verða frábýtt. Um kommunan er sinnað at gera langtíðar leigusáttmálar í Gundadali, er neyðugt at broyta serstøku byggisamtykt nr. 3, soleiðis at ásetingin, um at ikki má stykkjast út, verður strikað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstaka byggisamtykt nr. 3 verður broytt soleiðis, at ásetingin, um at C3-øki ikki kann stykkjast út, verður tikin burturúr.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. september 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 29. september 2011:** Einmælt samtykt at beina málið aftur í mentamála-nevndina, byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**191/11** **<u>2011-2159</u>**

**<u>Viðtaluhølir til 10. og 11. kommunulæknan í Suðurstreymoyar Læknadømi</u>**
(Víst verður eisini til j. nr. 2010-1937)

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Almanna- og heilsumálaráðið játtaði fyri tið síðani at normera 10. og 11. kommunulæknastarvið í Suðurstreymoyar Læknadømi, men bíða hevur verið við at lýsa størvini leys, til kommunan hevði viðtaluhøli til taks.

Umsitingin hevur arbeitt við ymiskum møguleikum og hevur eisini verið í samráðingum við P/f. Miðlon um at leiga høli til 3 læknar á aðru hædd í Miðlon.

Ráðgevi hevur fyri útleigaran latið gera innrættingaruppskot, har serligur dentur er lagdur á møguleikar til samstarv, fakligt umhvørvi og felagsfunktiónir. Uppskotið hevur støði í høliskrøvunum sambært kunngerð nr. 64 frá 29. september 2004 um støðið, viðlíkhald, rakstur v.m. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum; álitinum um nýggja kommunulæknaskipan handað landsstýrismanninum í heilsumálum í desember 2010, har serligur dentur er lagdur á, at kommunulæknaviðtalur skulu skipast í størri eindir; og ráðgeving frá lækna um arbeiðsgongdir v.m.

Leigukostnaðurin er kr. 980 um árið. Umbyggingarkostnaðurin er mettur til kr. 3.665.500, og verður afturgoldin yvir eitt ávíst áramál.

Talan er um stórt leigumál. Mett verður tí skilabest at gera ein 10 ára leigusáttmála við møguleika at leingja hann. Mett verður eisini skilabest, at umbyggingarkostnaðurin verður afturgoldin yvir 10 ár.

Støða verður seinni tikin til, hvørjir læknar skulu fáa í boðið at flyta inn í Miðlon. Ætlanin er at kommunulæknin, sum hevur viðtaluhølir í J. Paturssonargøtu, eisini flytir í Miðlon.

Samlaður árligur kostnaður verður við hesum:

| | | |
|---|---|---|
| Leigukostnaður | kr. | 637.980 |
| Umbyggingarkostnaður v/mvg | kr. | 366.550 |
| | kr. | 1.004.530 |

Leigukostnaðurin verður prístalsviðgjørdur. Neyðugt er við hægri játtan til kommunulæknaskipanina í 2012.

Heilsumálaráðið hevur givið endaliga váttan fyri, at tveir kommunulæknar verða settir afturat í Suðurstreymoyar Læknadømi, tá hølir verða tøk til tess – tó í fyrsta lagi 1. desember 2011.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at gera 10 ára sáttmála við P/f. Miðlon um at leiga 651 fermetrar til 3 kommunulæknar

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Sosiala nevnd 20.september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Útsett til nærri kanningar.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**192/11** **<u>2009-1391</u>**

**Útbygging av Hoyvíkshøllini**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**

Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein lýsing av tørvinum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at lýsa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at lýsa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**Uppískoyti:**
Skotið verður upp at byggingin verður skipað á tann hátt, at 260 $m^2$ verða bygdir í tveimum hæddum, tilsamans 520$m^2$, har bert veghæddin verður innrættað endaligt. Á veghædd verður høvuðsinngongd og forhøll, 4 áskoðaravesir, goymslur og tvey umklæðingarrúm við brúsum. Hetta loysir í fyrstu atløgu bráðfangis tørvin.

Í kostnaðarmetingini er roknað við, at restin av bygninginum ikki er innrættaður, hvørki við innveggjum, hurðum, el- og ljósbúnaði, hita-og sanitetsbúnaði endaligum lofti, gólvbúnaði, málaraarbeiði og trappu. Tað er fyrireikað fyri lyft, men lyftin er ikki við í kostnaðinum.

Kostnaðurin er 4.488.000 kr íroknað ókent, ráðgeving og mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,5 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (journal-nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

- Tilmæli kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Trivnaðarstjórin greiddi frá málinum.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Samtykt at heita á umsitingina um at fáa málið frá hondini.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
MAP Arkitektar hava gjørt skitsur av innrætting í mars 2010, og upprit v. kostnaðarmeting 17. februar 2010, áljóðandi kr. 4.587.245. Kostnaðarmeting har prosjektumsiting, ókent, prístalsregulering v.m. er lagt afturat meting ráðgevans, er av umsitingini mett til kr. 5.100.000. Tøkur peningur á játtanini er pr. 9. februar 2011 kr. 4.541.409. Írestandi kapitaltørvurin er á fyriliggjandi grundarlagi sostatt mettur til kr. 558.591.

Verkætlanin fevnir bert um liðugtgerð innan av pørtum av útbyggingini, sambært uppritinum hjá ráðgevanum.

Býráðið hevur 26. november 2009 samtykt at játta kr. 4,5 mió til verkætlanina, og 20. mai 2010 er samtykt at lata arbeiðið bjóða út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at:

- at góðkenna skitsuuppskotið hjá ráðgevanum
- at góðkenna uppskotið til sáttmála við ráðgevan
- at útvega metta írestandi kapitaltørvin á kr. 558.591 av íløgukontu 5775 L00001, løgujáttan,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Jákup Eghom Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 559.000 av framfluttum íløgukarmi fyri 2010.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Tann 27. juni 2011 var lisitatión uppá útbygging av Hoyvíkshøllini. 4 tilboð komu inn. Úrslitið frá lisitatiónini tann var:

1. J & K Petersen kr. 4.733.029,33 u/ mvg
2. ÁTS kr. 5.182.139,75 u/ mvg
3. Búsetur kr. 6.010.299,24 u/ mvg
4. Articon kr. 6.291.903,00 u/ mvg

Metingin í byggiskránni nov. 2009 er kr. 4.224.000,- u/ mvg.

Lisitatiónsúrslitið kann tulkast sum ein staðfesting av, at áður gjørda kostnaðarmetingin, sum hevur ligið til grund fyri politisku viðgerðini, hevur verið so tíðliga í verkætlanini og á einum so mikið leysum grundarlag, at neyvleikin á henni er at rokna sum vegleiðandi.

Ráðgevin hevur kannað, um møguligt er at spara í tilboðsupphæddini og metir, at tað ikki er ráðiligt, tí hetta kemur at ganga út yvir umklæðingarrúmini, sum ikki verða tøk, um sparing verður gjørd. Tær sparingar, sum kundu komið uppá tal, eru longu gjørdar í byggiskránni og í projekteringini.

Kannað er eisini, hvar munurin millum byggiskrá og tilboð stavar frá. Í byggiskránni er ikki roknað við, at bygningurin kemur so langt niður á parkeringsøkið, sum tær neyvu uppmátingarnar í projektinum hava staðfest.

Tað er serliga hetta, sum ger seg galdandi, har "grundin" verður hægri, sum er frávikið millum tilboð og byggiskrá.

Umsitingin hevur tí eisini kannað møguleikan fyri at gagnnýta hæddarmunin á økinum til kjallara, so at hølir, sum stórur tørvur er á í hesi høllini, kunna gerast undir útbyggingini, ístaðin fyri at fylla upp.

Tilboð uppá hetta arbeiðið er heintað inn frá lægstbjóðandi uppá upprunaútbjóðingina.

Við støði í frágreiðing frá MAP Arkitektar, sum er ráðgevi á verkætlanini um útbygging av Hoyvíkshøllini, hevur tekniska fyrisitingin gjørt kostnaðarmeting av, hvat verkætlanin, íroknað allar útreiðslur, kann væntast at koma at kosta. Íroknað hesa kostnaðarmeting er eisini umlegging av fjarhitarørum sum koma at liggja undir byggingini, og sum Fjarhitafelagið krevur flutt.

Fíggjarlig viðurskifti:
Býráðið hevur áður játtað kr. 5.100.000,- tilsamans til verkætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at taka av tilboðnum hjá J & K Petersen um upprunaliga tilboðið á kr. 4.733.029,33 u/ mvg og av ískoytistilboðnum á kr. 263.040,- at byggja fulla óinnrættaða veghædd undir umklæðingarrúmunum, og gera sáttmála við J & K Petersen um tilsamans kr. 4.996.069,33.

**Mentamálanevndin 8. september 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at taka av tilboðnum uppá kr. 4.996.069,33 frá J & K Petersen.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**193/11** **2011-2171**

**Viðvíkjandi umbøn um eykajáttan til Dagstovnin í Hoyvík**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Dagstovnurin í Hoyvík hevur nú í nøkur ár drigist við eitt rættiliga stórt undirskot. Framflutta undirskotið er kr. 470.000, ið er savnað saman gjøgnum nøkur ár, bæði meðan stovnurin var sjálvsognarstovnur og sum kommunalur stovnur. Fyri ein part stavar undirskotið frá, at tey í eina tíð, ikki fingu flutt børn úr vøggustovu í barnagarð, tí einki pláss var í barnagarðinum, og fingu ikki nóg skjótt sett tímatalið niður. Umsitingin hevði í longri tíð regluligar eftirlitsfundir við táverandi leiðara til tess at fáa fíggjarstýringina á beint, tað eydnaðist at lækka undirskotið nakað, men enn vantar nógv í. Fyri einum ári síðan varð nýggjur leiðari settur á stovninum.

Stórar umvælingar fara eisini fram á stovninum og ávirkar hetta í stóran mun virksemið. Stovnurin heldur í løtuni til í trimum ymiskum húsum. Neyðugt hevur verið at seta eyka fólk, og sum harvið hevur við sær eykaútreiðslur, ið fíggjarætlanin ikki hevur lagt upp fyri. Søkt verður um kr. 150.000.

Stovnurin hevur fingið boð um stranga fíggjarstýring bæði í mun til lønir og rakstur.

Til ber at fíggja eykajáttanina kr. 620.000 útreiðsluneutralt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla til, at veitt verður Dagstovninum í Hoyvík konta 3120 ein eykajáttan uppá kr. 620.000 til at fáa burtur undirskotið og til eykaútreiðslur í sambandi við áleikandi umvælingararbeiðið, og at eykajáttanin verður fíggjað av kontu 3215 aðrar útreiðslur.

**Mentamálanevndin 21. september 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Samtyktt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 620.000 av konto 3215 aðrar útreiðslur.

**Býráðið 29. september 2011:** Einmælt samtykt.

**194/11** **<u>2010-2971</u>**

**<u>Keyp av útgerð og leikum til frítíðarskúlan hjá Sankta Frans skúla</u>**.

Vanligt hevur verið tey seinastu árini, at tá dagstovnar eru stovnsettur, hevur leiðarin umsitið peningin, ið er ætlaður til leikur og útgerð. Hetta kom í lag, tí umsitingin brúkti ov nógva tíð til at bóka og fylgja við hvørjari rokning. Til frítíðarskúlar er kr. 3.000,00 settar av til hvørt barnið. Frítíðarskúlin í Sankta Frans skúla er normerðaður til 48 børn, tað gevur kr. 144.000,00 tilsamans.

**Tilmæli:**

Trivnarðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at kr. 144.000,00 verða fluttar av verkætlanini konta 4175, L41001 Sankta Frans skúli til Frítíðarskúlan í Sankta Frans skúla konta 3143.

**Mentamálanevndin 21. september 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og flyta kr. 144.000,00 av verkætlanini konta 4175, L41001 Sankta Frans skúlu til Frítíðarskúlan í Sankta Frans skúla konta 3143.

**Býráðið 29. september 2011:** Einmælt samtykt.

**195/11** **2009-0258**

**Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.

Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jan Poulsen | Eddie Joensen |
| Katrin Joensen | Petur í Gong |
| Martin Dam | Júst Rubeksen |

**Ískoyti:**
Áheitan frá Katrin Joensen um at velja annað umboð fyri seg í nevndina.

**Býráðið 8. september 2011:** Útsett.

**Býráðið 29. september 2011:** Útsett.

**196/11** **2008-4660**

## Valbólkar til val av 1. og 2. varaborgarstjóra og nevndum

**Býráðið 20. november 2008:** Marin Katrina Frýdal boðaði frá, at Javnaðarflokkurin og Tjóðveldið vóru gingin saman í valbólk við tilsaman 9 umboðum.

Sjúrður Olsen boðaði frá, at Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin vóru gingnir saman í valbólk við tilsaman 4 umboðum.

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Heðin Mortensen boðaði frá, at Javnaðarflokkurin og Tjóðveldið vóru gingin saman í valbólk við tilsaman 8 umboðum.

Sjúrður Olsen boðaði frá, at Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin vóru gingnir saman í valbólk við tilsaman 5 umboðum.

197/11 **2008-4662**

## Val av fíggjarnevnd

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Fíggjarnevnd skal veljast við borgarstjóranum sum føddum formanni og 4 øðrum kommunustýrislimum sum limum.

Eisini skulu veljast 5 tiltakslimir.

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Heðin Mortensen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Jógvan Arge | Levi Mørk |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Heðin Mortensen | Levi Mørk |
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |
| Bogi Andreasen | Anfinn Brekkstein |

**198/11** **2008-4663**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í sosialu nevnd**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |

**199/11** **2008-4664**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í mentamálanevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Elin Lindenskov |
| Jákup Símun Simonsen | Marin Katrina Frýdal |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Elin Lindenskov |
| Halla Samuelsen | Jákup Símun Simonsen |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |
| Vagnur Johannesen | Bogi Andreasen |

**200/11** **2008-4665**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í teknisku nevnd**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jákup Símun Simonsen | Jógvan Arge |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |

| | |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen |

**201/11** **2008-4666**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Jákup Símun Simonsen | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**202/11** **2008-4668**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í heilsu- og umhvørvisnevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |

| | |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Jákup Símun Simonsen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jan Christiansen | Vagnur Johannesen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |

**203/11** **2008-4669**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í havnanevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Bogi Andreasen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Levi Mørk | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Jan Christiansen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Levi Mørk |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**204/11** **2008-4673**

**Val av 3 limum og tiltakslimum í hýruvognsnevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Halla Samuelsen Maria | Hammer Olsen |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**205/11** **2008-4674**

**Val av brunanevnd**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Brunanevnd skal veljast við borgarstjóranum sum føddum formanni og 2 øðrum kommunustýrislimum sum limum.

Eisini skulu veljast 3 tiltakslimir.

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Heðin Mortensen | Bogi Andreasen |
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Ískoyti:**

Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

206/11 2008-4676

**Val av einum limi í nevndina fyri barnabókaheiðursløninа**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært reglugerðina fyri nevndina er barnabókavørðurin á Býarbókasavninum fastur limur, ein limur er valdur av Felagslærararáðnum við kommunalu skúlarnar í Tórshavn, tveir limir valdir av Tórshavnar býráð og herumframt er formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs fastur limur og er formaður í nevndini.

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru Jógvan Arge og Irdi Danielsen.

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

207/11 2008-4678

**Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-stýrið**

Sbrt. § 4 í kunngerð nr. 49 frá 4. oktober 1965 um góðkenning av viðtøkum hjá interkommunala elektricitetsfelagnum SEV velur umboðsnevndin fyri SEV 7-mannastýri fyri SEV, og fær Tórshavn ein stýrislim. Umboðsmenninir fyri Tórshavn skjóta upp valevni til umboðsnevndina.

Býráðið setur vanliga uppskot fram um, hvørjar býráðið skjýtur upp sum valevni til val av stýrislimi og varalimi.

**Býráðið 20. november 2008:** Skotið verður upp at velja

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Heðin Mortensen |

**Ískoyti:**

Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**208/11** **2008-4679**

**Val av limi í kaldbaksnevndina**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
3 limir eru valdir av borgarum í Kaldbak og Kaldbaksbotni.

Býráðsformaðurin er føddur formaður.

Fimti limurin skal veljast av býráðnum.

**Býráðið 20. november 2008:** Valdur varð Vagnur Johannesen.

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**209/11** **2008-4680**

**Val av limi í hvítanesnevndina**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
3 limir eru valdir av borgarum á Hvítanesi.

Býráðsformaðurin er føddur formaður.

Fimti limurin skal veljast av býráðnum.

**Býráðið 20. november 2008:** Valdur varð Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**210/11** **2008-4681**

**Val av kirkjubøar-velbastaðarnevnd**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
3 limir eru valdir av borgarum í Kirkjubø og Velbastað.

Býráðsformaðurin er føddur formaður.

Fimti limurin skal veljast av býráðnum.

**Býráðið 20. november 2008:** Valdur varð Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**211/11** **2008-4682**

**Val av nólsoyarnevnd**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
3 limir eru valdir av borgarum í Nólsoy.

Býráðsformaðurin er føddur formaður.

Fimti limurin skal veljast av býráðnum.

**Býráðið 20. november 2008:** Valdur varð Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

212/11 2009-0269

**Val av 5 limum í kollegiunevndina fyri 4 ár.**

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Katrin Gaard, Bjarni Dahl, Tóri á Kák Olsen, Mads A. Winther og Gunnar Mohr.

- Tóri á Kák Olsen, sum er limur í kollegiunevndini er fluttur av landinum, tí skal nýggjur limur veljast.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt at velja Jógvan Arge í kollegiunevndina.

- Bjarni Dahl, sum er limur í kollegiunevndini er fluttur av landinum, tí skal nýggjur limur veljast.

**Býráðið 29. september 2011:** Einmælt samtykt at velja Levi Mørk í kollegium-nevnddina

FUNDUR LOKIN KL. 20:50

GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Inga Dahl |
| | Heðin Mortensen | |